## Óvissa um Kewell

Harry Kewell skal komandi kappingarár spæla í turkiskum fótbólti. Tað skrivar heimasíðan hjá Galatasaray. Men heimasíðan hjá Liverpool ber eina aðra søgu, sum sigur at tað als ikki er vist, at Kewell endar í Turkalandi. Tó er greitt, at avstraliumaðurin ikki heldur fram í Liverpool. 29 ára gamli avstraliumaðurin, sum seinastu fimm kappingarárini hevur spælt við Liverpool, fekk ikki longt sáttmálan við enska felagið, og heldur tískil fram í Galatasaray. Kewell er liðformaður á avstralska landsliðnum, og hevur spælt 138 dystir fyri Liverpool og gjørdi 16 mál.

## Bon Jovi órógvar EB/Streym

EB/Streymur sleppur ikki at spæla á City of Manchester Stadium, sum teir annars høvdu ætlað. Orsøkin er tann, at Bon Jovi hevði konsert á stadion herfyri, og tað fór so mikið illa við vøllinum, at tað nú er neyðugt at spæla aðrastaðni. Tískil verður spælt á Oakwell Ground. Heldur ikki EB/Streymur leggur sín egna heimavøll til, men tað er rætt og slatt tí, at tað ikki letur seg gera. Heimadysturin verður á Tórsvølli.

# Símun stóð fyri uppleggunum




**Føroyski landsliðsspælarin, Símun Samuelsen, legði upp til tvey av málunum, tá ið Keflavík við 3-1 sigri á heimavølli sendi FH úr steypakappingini**

ÍSLAND
*Jákup Mørk*
*rolant@sosialurin.fo*

Símun Samuelsen átti stóran leiklut, tá ið Keflavík hóskvøldið á heimavølli vann 3-1 á FH av Hafnafirði í 16. parts finaluni í VISA steypakappingini. Talan var um uppgerð millum steypavinnararnar tvey tey seinastu árini, og tað var altso Keflavík, sum endaði omaná.

Hesi bæði liðini eru tey bæði ovastu í landskappingini. FH hevur 22 stig, og Keflavík hevur 19 stig. Longu sunnudagin hittast hesi bæði liðini aftur. Tá verður tað í landskappingardysti, og tá verður tað aftur á heimavøllinum hjá Keflavík.

Einki er at ivast í, at teir í FH sunnudagin fara at hava serliga vakið eyga við føroyska landsliðsspælaranum Símuni Samuelsen. Símun var á vøllinum allar 90 minuttirnar hóskvøldið. Hann taldist ikki millum málskjúttarnar, men føroyski spælarin átti týdningarmiklan leiklut:

Tá ið Guðmundur Steinarsson í 18. minutti skoraði til 1-0, var tað eftir upplegg frá Símuni Samuelsen, og tá ið Guðjón Á. Antoníusson seks minuttir seinni økti um heimaleiðsluna til 2-0, var tað aftur eftir sending frá Símuni Samuelsen.

Tveir minuttir fyri leiklok minkaði FH um munin, men bara ein minutt seinni staðfesti Patrik Ted Redo eftir snarálop 3-1 heimasigurin.



*Súni Olsen vil finna spæligleðina aftur í B36*

# Súni Olsen til B36

**Gøtumaðurin og landsliðsleikarin, Súni Olsen, hevur gjørt sáttmála við B36**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Stutt fyri døgurða í dag gjørdist greitt, at B36 og Súni Olsen eru komin ásamt um at gera sáttmála. Súni Olsen váttar søguna fyri Sosialinum, og sigur soleiðis:

– B36 er eitt stórt felag í Føroyum, teir hava høgar málsetningar og eg gleði meg at spæla við teimum.

Súni Olsen hevur spælt við Viborg, sum flutti niður í næstbestu deildina, og áðrenn tað spældi hann við AaB, sum vann danska meistaraheitið í ár. Spurdur um tað ikki er eitt stórt fet skeiva vegin hjá honum, sigur Súni Olsen, at hann ikki skal siga hvønn veg tað vendur.

– Men hjá mær snýr tað seg um at fáa spæligleðina aftur, og eg eri sera fegin um avtaluna, eg havi gjørt við B36.

B36 hevur júst drigið danska SAS-ligu felagið Brøndby í UEFA-Cup. Súni Olsen hevur seinastu árini spælt SAS-liga fótbólt, og fegnast hann um lutakastið hjá B36.

– Sjálvandi hevur lutakastið týdning fyri mítt val. Eg havi spælt nógv ár í Danmark, og eri ikki eitt heilt ókent navn. Spæli eg tveir góðar dystir móti teimum, so veit man ikki hvat kann henda, men mítt fokus er sjálvandi á B36 nú, sigur Súni Olsen, sum ætlandi verður partur av B36-hópinum til dystin móti KÍ sunnudagin.

# Potemkin og Jónas til NSÍ

**NSÍ hevur gjørt sáttmála við bæði Karoly Potemkin og Jónas Þór Næs**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jónas Þór Næs hevur gjørt sáttmála við NSÍ. Tað hevur Karoly Potemkin eisini. Sostatt hevur NSÍ styrkt um bæði verju og álop, nú komið er hálvan vegin við landskappingini.

Jákup í Stórustovu, umboðsmaður hjá Jónas Þór Næs, váttar, at ungi havnarmaðurin hevur gjørt sáttmála við NSÍ, og formaðurin hjá NSÍ, Dánjal Pauli Højgaard váttar somuleiðis, at teir hava knýtt Jónas og Karoylu at hópinum.

– Vit meta, at Potemkin kann styrkja um álop okkara, og styrkirnar hjá Jónas kenna vit øll, og hann kann spæla á fleiri plássum, sigur Dánjal Pauli Højgaard.

Hann vísir á, at kappingarárið er langt, og at tað tískil er týdningarmikið við einum breiðum hópi.

NSÍ skal í eldin longu í kvøld, tá Víkingur kemur á vitjan. Til henda dystin verður Karoly Potemkin við, men meiri ivasamt er hvussu tað verður við Jónas Þór Næs.